# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Edmund má nýta sína lyklastøðu

Uttan mun til, hvat danskir eygleiðarar siga, so bendir alt á, at Edmund Joensen er komin í eina parlamentariska lyklastøðu. Hetta eigur at geva Edmundi nakað heilt álvarsligt at hugsa um. Edmund Joensen hevur longu signalerað, at hansara stuðul er uttan serstakar treytir. Hetta virkar ikki klókt, og hetta virkar ikki at sampakka við tann drivna taktikkaran av Oyri. Víst hevur Sambandsflokkurin heilt frá byrjan av 20. øld siðvenju fyri blint at fylgja Venstre. Hinvegin er tíð at endurskoða hesa nulstrategi og tann maður, ið megnar hetta, er júst Edmund Joensen. Hann eigur tí at hugsa seg væl um og seta Fogh treytir. Hvussu harðar hesar treytir skulu vera veldst um, men júst Edmund hevur als onga orsøk til at lata sín stuðul ókeypis.

Edmund eigur nú at hugsa: -Dýrt skulu teir meg keypa. Hann eigur at gera sær eitt yvirlit yvir mál og evni, har danir enn hava ávirkan á føroysk viðurskifti og krevja hesi mál loyst uttan himpr. Hvørji eru hesi mál? Tað fyrsta, ið fellur í eyguni, er tann óvissa, ið ræður á uttanríkispolitiska økinum og tá serstakliga í mun til okkara ES samstarv ella rættari manglandi ES samstarv. Í áravís hava føroyskir myndugleikar roynt at sleppa uppí granskingar- og útbúgvingarstamstarvið hjá ES. Her er als einki hent, og her tykist standa fullkomuliga í botni. Danir eru púra líkasælir, ES hevur vent okkum bakið, og einki bendir á, at nøkur loysn er í ljósmála. Her eigur Edmund at seta síni krøv um treytaleysan og effektivan diplomatiskan stuðul frá ríkisstjórnini, so loysn fæst á hesum máli, ið Tinganes eftir øllum at døma ikki megnar at loysa.

Við norðurlandamálum gongur eins striltið. Einki kom burtur úr okkara umsókn um limaskap, og stuðulin úr Danmark var bert eitt eiti. Einki bendir á, at Danmark legði tað trýst á brøðratjóðirnar, ið kundi havt gjørt munin. Ein orsøk til hetta var tann vanliga danska undanførslan um grundlógina. Krev ein loysn her, Edmund, og fá danir til saman við føroyingum at finna eina líka so sømiliga loysn, sum gjørt var í undirgrundarmálinum! Edmund kann eisini útvega pengar til eitt hungrandi føroyskt mentanarlív eitt nú við at blása lív í gamla hugskotið um, at tann peningur danski staturin sparir við yvirtøkum, ikki skal fara í statskassan men í Dansk-færøsk Kulturfond. Um hetta ikki ber til, so fá Fogh at játta nøkur oyru til henda grunn, sum í dag bert er eitt eiti við lítlari og ongari fíggjarorku. Eisini eiga føroyingar at fáa atgongd til danskar mentanar- og ítróttargrunnar. Hetta er sjálvsagt, tí vit rinda til teirra umvegis okkara luttøku í danskari ítróttarvedding.Danskir fjølmiðlar bagatellisera støðu Edmunds. Hetta er mjørkatos, tí so ótrygg støða Foghs er við eini labilari Ny Alliance, fær Fogh til eina og hvørja tíð brúk fyri Edmundi, og tí er Edmund veruliga í lyklastøðu – tað kann bert vera skilagott at nýta hesa støðu til gagns fyri Føroyar.

**Sosialurin**

## Fólkatingsvalið

ZAKARIAS WANG



**Eitt og hvørt val hevur okkurt nýtt við sær, men kann úrslitið av fólkatingsvalinum siga okkum nakað?**

**Valskipan**
Eitt mál, sum nógv hevur verið umrøtt, er hvørt valskipanin við lutfalsháttinum hjá d'Hondt er rættvís ella ikki. Sum kunnugt gevur hon ein ávísan fyrimun til teir stóru flokkarnar. Skuldu vit givið eitt støddfrøðiliga rætt býti av 33 tingmonnum, so fáa teir báðir størstu flokkarnir hvør sínar 8, teir tveir næststørstu 7, Miðflokkurin 2 og Sjálvstýrisflokkurin 1. Við tí máta, sum tingið skal veljast eftir nú, verður býtið nágreinliga tað sama, so problemið er ikki so stórt, sum hildið hevur verið. Áhugavert er, at tað er Javnaðarflokkurin, sum fær tann tretivintaogtriðja tingmannin, sum kemur afturat teimum tretivuogtveimum í núverandi tinginum.

**266 B málið**
Greiða støðan í hesum máli gav Miðflokkinum undanvind, men úrslitið gjørdist, at vit mistu ein fólkatingsmann, sum á løgtingi atkvøddi ímóti 266 B, og fingu ein annan, sum við síni avgerandi atkvøðu bar málið ígjøgnum á tingi.

**Heimastýrisflokkarnir**
Teir flokkar, sum fingu samtykt heimastýrislógina, vóru Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin. Teir hava havt avgerandi valdið í Føroyum síðani, tí einki landsstýri hevur verið skipað, uttan at onkur av hesum flokkum hevur verið við í tí.

Á hesum vali fingu hesir flokkar atkvøður til 16 av 33 tingmonnum og eru sostatt í minniluta. Tað hevði tí borið til at gjørt eitt landsstýri uttan at nakar av heimastýrisflokkunum var við, men vit kunnu vísa á, at tað eisini hevði borið til í 1998, og tá var hesin møguleiki ikki nýttur.

Skulu vit koma longur í føroyskum politikki, er tí helst neyðugt at taka uppnýggjan tátt.

## Null-loysnin

RICHARD DANIELSEN



Nógv hevur verðið skrivað um null-loysnina, og regla oman á reglu verður løgd oman á okkum, hvussu vit skulu bera okkum at í ferðsluni. Tað almenna eigur at ganga á odda í hesari stremban.

Her fari eg at venda mær til mína egnu kommunu, Fuglafjarðar kommunu: Gerið hávatenn og seti trýkant á krossin omanfyri havnaskrivstovuna, har stórur skaði hendi herfyri, sum lætt kundi verið nógv verri. Fái eisini skil á krossin oman fyri skúlan, har so mong børn og ung ganga hvønn dag, áðrenn skaði verður her.

## Rættleiðing

Av misgáum var Rúna Sivertsen ikki komin við á listan yvir tær 10 fremstu kvinnurnar á fólkatingsvalinum. Heidi Petersen stóð á 10. plássi, men við hennara 131 atkvøðum, átti hon av røttum at staðið á 11. plássi. Hetta var besta valið hjá Rúnu Sivertsen nakrantíð, tí hon setti persónligt met. Vit umbera mistakið.

Eisini var ein feilur í atkvøðutalinum hjá Rodmundi Nielsen í Fólkaflokkinum sum fekk 236.

**Helena Dam á Neystabø**
784
**Annita á Fríðríksmørk**
625
**Annika Olsen**
535
**Bjørt Samuelsen**
336
**Ingvør Nolsøe**
215
**Eyðgunn Samuelsen**
161
**Kirstin Strøm Bech**
152
**Mamy Dahl Sørensen**
151
**Bergtóra H. Joensen**
151
**Rúna Sivertsen**
145

Eisini kom lutur í tey, sum ikki vórðu vald á ting, um vit tóku fólkatingsvalið sum eitt valúrsliti. Tí prenta vit listan umaftur við teimum, sum ikki høvdu megnað at vinnið sæti á tingi:

**FÓLKAFLOKKURIN**
**Ikki vald**
Bjarni Djurholm 200
Poul Michelsen 165
Heðin Zachariasen 133
Kjartan Joensen 66

**SAMBANDS-FLOKKURIN**
**Ikki vald**
Olav Enomoto 133
Marjus Dam 126

**JAVNAÐAR-FLOKKURIN**
**Ikki vald**
Vilhelm Johannesen 113
Kristian Magnussen 106

**TJÓÐVELDIS-FLOKKURIN**
**Ikki vald**
Heidi Petersen 131
Páll á Reynatúgvu 93

**MIÐFLOKKURIN**
**Ikki vald**
Bill Justinussen 182


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.